# Ferðafólk nummar hundraðtúsund

**Ferðafólk nummar 100.000 hjá Atlantsflogi í ár varð innskrivað á flogvøllinum í Vágum hósmorgunin**



*Magni Arge og Regin Eikhólm, v.m. fegnast, meðan hepni vinnarin, Vilbjørg Eikhólm, ovfarin hyggur at vinninginum, hon júst hevur fingið sum ferðafólk nummar hundraðtúsund hjá Atlantsflogi í ár*

*Mynd: Edvard Joensen*

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Ferðafólkatalið hjá Atlantsflog er fyri fyrstu ferð nakrantíð í einum álmanakkaári farið upp um 100.000. Tað hendi hósdagin, tá Vilbjørg Eikhólm í Havn varð innskrivað á rutuni til Keypmannahavnar.

Hon var nakað ovfarin og glað, tá hon fekk at vita, hví so nógv myndatól vóru rundan um hana.

Eftir at Vilbjørg smaan við manninum Regini hevði skrivað seg inn, varð kunngjørt í hátalunum í terminalinum, at nú var ferðafólkatalið hjá Atlantsflogi farið um tey 100.000 í ár.

Síðan fekk hepna feðrafólkið handað blómutyssi frá Atlantsflogi, eins og stjórin, Magni Arge, eisini handaði henni ein ferðaseðil fyri tvey, sum brúkast kann á rutunetinum hjá felagnum.

Magni Arge segði í stuttari røðu fyri hepnu ferðafólkunum, at tað frøddi hann, at tað vóru fólk, sum regluliga nýttu felagið, sum fingu hendan heiðurin.

Samstundis segði Magni Arge, at væntandi kann eitt annað hvast horn rundast komandi ár. Nevniliga at Atlantsflog fer at flyta ferðafólk nummar eina millión samanlagt. Tí sum er, hevur felagið flutt 920.000 ferðafólk, síðan byrjað varð í 1988, segði hann.

# Grønt og reytt á flogvøllinum

**Tollavgreiðslan á flogvøllinum í Vágum verður nú lættari. Bæði hjá ferðafólki og starvsfólki. Ferðafólk velja nú sjálv, um tey vilja fara eftir grønu ella reyðu útgongdini**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Grønar og reyðar útgongdir eru nú gjørdar á flogvøllinum i Vágum. Tað merkir smidligari tollavgreiðslu, sum fer at merkjast bæði hjá ferðafólkinum og tollarunum á flogvøllinum.

Hesar grønu og reyðu útgongdirnar eru vanligar í tollavgreiðslum aðrastaðni. Og eisini á farstøðini í Havn hevur hendan skipan verið galdandi eina tíð, sigur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari.

At tað ikki fyri langari tíð síðan er gjørt á flogvøllinum, kemst av trongligum hølisviðurskiftum. Men nú hevur Statens Luftfartsvæsen gjørt eina útbygging, soleiðis at hetta er møguligt.

Her eftir skulu ferðafólkini sjálv meta um, hvørt tey hava eitthvørt at tolla ella ikki. Tey, sum meta seg hava tollskyldugar vørur við, skulu so fara gjøgnum reyðu útgongdina, meðan hini, sum einki hava at tollgreiða, fara gjøgnum ta grønu.

Tað verður nú ikki so, at tollararnir fara til hús kortini. Teir skulu í fyrsta umfari avgreiða tey, sum venda sær til teirra, men eisini taka stakroyndir av teimum, sum fara gjøgnum grønu útgongdina.

– Tí tá fólk hava valt útgongd, hava tey samstundis sagt frá, um tey hava tollskyldurgar vørur ella ikki, sigur Kjartan Dam Joensen. Avdúkar so ein stakroynd tollskyldugar vørur í viðførinum hjá einum, sum fer um grønu útgongdina, fellur hamarin, og bót verður útskrivað.

Royndirnar út Havnini vísa, at tað lættir munandi um, at fólk velja sjálv. Og tær vísa eisini, at fólk sum heild geva rætt upp, sigur yvirtollarin.

Skipanin við reyðu og grønu útgongdini á flogvøllinum byrjaði mikudagin.




*Onkrar umbyggingar eru gjørdar á flogvøllinum, so fólk sjálv velja, um tey fara gjøgnum grønt ella reytt eftirlit. Samstundis eru nýggir viðførisvognar keyptir, sum Føroya Sparikassi, Føroya Banki og Trygd hava sponsorerað*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Jólasangløta í Sørvági

**Í missiónshúsinum Libanon í Sørvági fara tey sunnudagin at hava jólasangløtu við fjølbroyttari skrá**

SANGLØTA

Jólini verða sungin inn í missiónshúsinum Libanon í Sørvági sunnudagin klokkan 15.00.

Tiltakið byrjar við innleiðing og bøn, áðrenn rættiliga verður farið at syngja.

Sangurin verður nógvur og frá fleiri luttakarum. Fyrst veðru felagssangur, og síðan gongur upp á skift millum barna- og ungdsdómssangkór og upplestur úr Nýggja Testamenti.

Kórini, sum fara at luttaka, eru barnakórini í missiónshúsunum í Sørvági, Miðvági og Sandavági, eins og streingjakóriðí Sørvági eisini er við í tiltakinum.

Til allar seinast verður, sum tað eigur eina slíka løtu, kendi jóalsálmurin »Gleðilig jól« sungin.

ej



# Fíggjarlógin endaliga samtykt



*Samgongan stóð saman, tá atkvøðast skuldi um fíggjarlógina við 3.viðgerð mikudagin. Sjálvur hevði meirilutin bara smávegis broytingar, ið vóru samtyktar, meðan øll 13 broytingaruppskotini hjá andstøðuni vóru feld.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í tólvta tíma komu ikki færri enn 15 broytingaruppskot til 3.viðgerð av fíggjarlógini fyri 2003, harav 13 komu frá andstøðuni. Men samgongan stóð saman og feldi øll uppskot frá andstøðuni, áðrenn fíggjarlógin varð endaliga samtykt.**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

So er fíggjarlógin endaliga samtykt og endaliga avgreidd frá løgtinginum.

Hetta kundi Edmund Joensen, tingformaður, staðfesta, nakað áðrenn klokkan fýra seinnapartin mikudagin. Frammanundan hevði formaðurin í fíggjarnevndini sum siður er endað orðaskifti, áðrenn atkvøðugreiðslurnar. Óli Breckmann takkaði tinglimum og landsstýrismonnum fyri fíggjarlógararbeiðið og undirstrikaði samtíðis, at nú sjálv viðgerðin er liðug, byrjar tunga arbeiðið at føra fíggjarlógina út í lívið. Við hesum sipaði Óli Breckmann millum annað til tær lógarbroytingar, ið skulu fremjast, fyri at játtanir kunnu halda

Fíggjarlógin fyri 2003 javnvigar við stívliga 3,6 milliardum krónum. Yvirskotið er mett til 240 milliónir krónur, og tá avdráttirnir av skuld landskassans eru goldnir, leypa 90 milliónir av.

Við 3.viðgerð høvdu samgongulimirnir í fíggjarnevndini onkrar smávegis broytingar til fíggjarlógaruppskotið, men hesar vóru útreiðsluneutralar, tvs. at peningur var fluttur av eini játtan yvir á eina aðra. Millum annað var ein hálv millión tikin av játtanini til fiskivinnumenning á landi, og í staðin skulu pengarnir brúkast til trygdarskeið hjá sjómonnum.

Men meðan samgongan stórt sæð helt fast við síni egnu tøl frá 2.viðgerð, so hevði andstøðan ikki færri enn 13 broytingaruppskot til 3. viðgerð. Millum annað varð skotið upp at halda fast við upprunaligu játtanina til landssjúkrahúsið og til Klaksvíkar sjúkrahús. Játtanir, ið samgongan hevur skorið við ávíkavist 8,3 milliónum og 2,25 milliónum. Eisini mælti andstøðan til at seta tilsamans níggju milliónir á aftur játtanina til fólka- og fyritíðarpensjónir – játtanir, ið samgongan hevur skorið við tilsamans 25 milliónum krónur. Andstøðan mælti til at seta seks milliónir krónur aftur á játtanina til stuðul til uppihaldspening, ið samgongan hevur strikað. Andstøðan mælti til at játta eina millión afturat á kontoini til stuðul til ávísar pensjonistar, nú sjónvarpsgjaldið er so nógv hækkað.

Men samgongan stóð saman og feldi øll broytingaruppskotini frá andstøðuni. Eingin slingur í valsinum var at hóma, tá trýstast skuldi á atkvøðuknøttarnar, og øll andstøðuuppskotini vóru feld við 17 atkvøðum ímóti og 15 fyri.

### Settu spurnartekin

Eisini undir 3.viðgerð settu tinglimir, bæði úr samgongu og andstøðu, spurnartekin við, hvørt talan yvirhøvur er um eina realistiska fíggjarlóg, ið fer at halda. Í fleiri førum varð ivi sáddur um játtanir og metingarnar av inntøkum og útreiðslum fara at halda, ella um neyðugt verður við eykajáttanum. Eisini eftirlýstu tinglimir, serliga úr andstøðuni, tann nógv umrødda skattalættan, ið ikki sæst aftur á fíggjarlógini, hóast avleiddu meirinntøkurnar av honum eru settar til 10 milliónir krónur í fíggjarlógini fyri 2003.

